TRIVNAÐARÆTLAN

Skúlin í Eysturkommunu

INNIHALD

1. Mál skúlans og virðisgrundarlag 4
Okkara samleiki 4
Trivnaðurin í hásæti 4
Tolsemi eyðkennir skúlan 4
Næmingarnir mennast og gerast sjálvstøðugir 5
Kveikja og menna hugflogið 5
2. Ábyrgd og leiklutir 6
Skúlastýrið 6
Leiðslan 6
Flokslærarin 6
Førleikastova 6
Heilsufrøðingur 7
Foreldur og verjar 7
Foreldraráð 7
Næmingurin 7
Heimaarbeiði 7
3. Afturvendandi tiltøk í innskúlingini 8
August – desember 8
Januar – juni 9
4. Afturvendandi tiltøk í miðdeildini 10
August – desember 10
Januar – juni 10
5. Atferðarreglur 12
Uppmøting 12
Fríkorter 12
Til og frá skúla 12
Annað 12
6. Happingarpolitikkur 13
Endamál 13
Hvat er happing? 13
Hvussu fyribyrgir skúlin happing? 13
Hvussu fyribyrgir heimið happing? 13
Hvat gera vit, tá næmingur verður happaður? 14
7. Ætlan fyri næmingar við atferðartrupulleikum 15
Eyðkennir 15
Vit vilja 15
Hvør er mannagongdin 15

Møgulig fyribyrgjandi tiltøk 15
8. LP (læriumhvørvi og pedagogisk greining) 16
9. Sorgarætlan 17
Missur hjá einstaka næminginum: 17
Missur hjá lærara/starvsfólki: 19
10. Kontaktupplýsingar 20
Leiðsla 20
Lærarar 20
Námsfrøðingar og stuðlar 20
Skúlavegleiðari 20
Førleikastova 22
AKT lærarar 22
Heilsufrøðingar 22
Skúlastýrið 22

1. MÁL SKÚLANS OG VIRÐISGRUNDARLAG

Í Skúlanum í Eysturkommunu leggja vit serligan dent á:

- at skapa góðar umstøður fyri læru og spæli
- at trivnaðurin er í hásæti
- at tolsemi eyðkennir skúlan
- at næmingarnir mennast og gerast sjálvstøðugir
- at kveikja og menna hugflogið

OKKARA SAMLEIKI

Vit vilja, at skúlin er við til:

- at skapa og styrkja gleðina við at ganga í skúla, at menna gleðina við at læra og at økja um forvitnið og hugin at møta nýggjum avbjóðingum.
- at læra næmingarnar týdningin av almennari mentan so sum andsfrælsi og tolsemi.
- í góðum og tryggum kørmum og við dyggari frálæru at geva næmingunum ymsar avbjóðingar, uppgávur og skyldir, ið svara til teirra fortreytir, so teir gerast sjálvstøðugir og mennast í treysti til sín sjálvs.
- við frásøgn, sjálvvirksemi, handaligum og skapandi upplivingum og javnmettari samrøðu at brynja teir út til at fara út í lívið.
- at fremja møguleikar fyri einum ábyrgdarfullum og skyldubundnum samstarvi við allar partar.

TRIVNAÐURIN Í HÁSÆTI

Vit vilja skapa so góðar, tryggar og vakrar karmar sum gjørligt. Eitt vakurt umhvørvi er við til at betra um trivnaðin og at skapa vakrar tankar.

Virksemi skúlans skal vera merkt av opinleika og gjøgnumskygni.

Kunning fer fram gjøgnum skrivligar fráboðanir, foreldrafundir og -samrøður, hugnakvøld, og á heimasíðu skúlans.

Vit raðfesta foreldrasamstarvið høgt, og foreldrini eru altíð vælkomin at seta spurningar og at koma við uppskotum og viðmerkingum til skúlans virksemi.

Skúlin leggur dent á at geva næmingum við serligum tørvi og teimum, ið bera brek, bestu umstøður, so skúlagongdin gerst so munadygg sum gjørligt.

Vit leggja stóran dent á, at hóast vit eru ymisk, so hava vit eins stórt virði í felagsskapinum.

Miðað verður eftir, at starvsfólk skúlans útbúgva seg støðugt og menna sín førleika. Hetta verður gjørt við m.ø. at fara á skeið og at hava aktuellan faklestnað á bókasavninum.

TOLSEMI EYÐKENNIR SKÚLAN

Vit vilja taka hond um hvønn einstakan næming. Hetta verður gjørt við m.ø. at tosa við einstaka næmingin, at hava smáar einstaklingasamrøður, at toymið tosar um einstøku næmingarnar, ger niðurstøður og eftirmetir og við viðtalum.

Vit vilja vera góðar fyrimyndir fyri næmingarnar. Tí leggja vit dent á jaligan tali- og verumáta. Vit átala, tá vit síggja ella hoyra óhøviskan ella óhóskandi atburð ella samrøðu.

Okkum er greitt, at eitt dygt foreldrasamstarv er ein sera týðandi táttur, um skúlans arbeiði skal eydnast. Tí leggja vit stóran dent á, at foreldur kenna seg hoyrd og sædd, at gott samskifti er millum partarnar, og at foreldur hava kensluna av, at tey verða tikin við upp á ráð. Her er opinleiki og gjøgnumskygni í skúlans arbeiði ein fortreyt.

Vit læra næmingarnar at hava umsorgan fyri hvørjum øðrum. Hetta verður gjørt t.d. við vanligum hjálpsemi, rolluspølum, "Trin for trin", reglum, sum galda í flokshølinum og við vanligari samrøðu.

Vit vilja hava ró og góðan matarsið í matarsteðginum.

NÆMINGARNIR MENNAST OG GERAST SJÁLVSTØÐUGIR

Vit vilja, at næmingarnir kenna, at vit hava álit á teimum, og at vit virða teir, sum teir eru, og at vit virða tað góða, teir gera.

Vit geva og læra næmingarnar at geva rós og sámiligar, men sannar, atfinningar.

Vit tala virðiliga við hvønn annan og vilja hava, at næmingarnir eisini tala virðiliga sínámillum.

Næmingarnir eiga altíð at hava frælsi til at koma við uppskotum, spurningum og viðmerkingum, og teir eiga at vera lærdir í at velja út, savna, kjakast, grunda, siga frá og at ummæla.

Vit vilja, at næmingarnir læra at taka ábyrgd av sær sjálvum og egnum gerðum, og at hava umsorgan fyri øðrum.

Vit vilja geva næmingunum bestu frálæru. Her verður hugsað um ymiskar undirvísingarhættir, nýtslu av alnótini og kunningartøkni og námsfrøðiliga lærudepilin á skúlanum. Læra teir at eygleiða og at meta um.

Ymisk tiltøk og øðrvísi arbeiðshættir eru eisini við til at gera næmingarnar sjálvstøðugar.

Vit vilja menna teirra virkishug og skapa líkindi fyri djúphugsan.

KVEIKJA OG MENNA HUGFLOGIÐ

Skapanarevni og skapanarhugur skulu vera høgt í metum á okkara skúla.

Vit halda, at eitthvørt menniskja hevur tørv á og gleði av at dyrka síni skapandi ella listarligu evni og gávur, so ymiskar tær enn kunnu vera.

Vit royna at geva næmingunum íblástur og menna teirra hugflog og skapa undran.

Hugflogið og skapanarevnini kunnu t.d. vera ment gjøgnum leik, myndlist, sang og gjøgnum handaligt virksemi. Her er góður møguleiki fyri at viðgera handverk og list bæði ítøkiliga og í alheims høpi.

Góður møguleiki skal vera fyri felags avrikum, fyri framførslum, framsýningum og prýði.

Eisini leggja vit dent á at viðgera okkara heimliga mentanararv og heimslist sum heild.

Starvsfólk skúlans skulu hava møguleika fyri eftirútbúgving, so sum skeið o.a..

2. ÁBYRGD OG LEIKLUTIR

SKÚLASTÝRIÐ

Skúlastýrið við Skúlan í Eysturkommunu er mannað við trimum foreldraumboðum, tveimum kommunustýrisumboðum og einum starvsfólkaumboði. Skúlastjórin er skrivari í skúlastýrinum.

Skúlastýrið hevur eftirlit við virksemi skúlans og tekur avgerð um øll viðurskifti skúlanum viðvíkjandi, ið ikki eru løgd undir kommunustýrið ella skúlastjóran.

Skúlastýrið ummælir árligu fíggjarætlanina fyri viðkomandi skúla og samskifti við kommununa um fíggjarligu og umstøður annars hjá skúlanum og viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúla-bygging/-umbygging.

Skúlastýrið viðger eisini saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum.

Skúlastýrið ásetur meginreglurnar um virksemi skúlans m.a. trivnaðarætlan, undirvísingarætlan, arbeiðsbýtið millum lærararnar og vikuætlanina, samarbeiðið ímillum skúla og heim v.m.

Skúlastýrið skal ummæla øll mál viðvíkjandi skúlanum, sum kommunustýrið tekur avgerð um, og skúlastýrið hevur rætt at ummæla øll mál, ið viðvíkja viðkomandi skúla í kommununi. Skúlastýrið gevur ummæli í øllum málum, sum kommunustýrið ella landsstýrismaðurin leggur fyri tað.

LEIÐSLAN

Leiðslan í skúlanum hevur ábyrgdina av, at skúlin áhaldandi hevur eitt virkið trivnaðararbeiði. Leiðslan syrgir fyri, at karmarnir viðvíkjandi ábyrgd og uppgávum eru greiðir. Leiðslan skal vera við til at endurskoða trivnaðararbeiðið. Hetta verður gjørt eftir tørvi, men á hvørjum ári luttekur leiðslan, saman við førleikastovuni, á einum felags fundi, sum hevur til endamáls at viðgera trivnaðararbeiðið sum heild, koma við møguligari nýggjari kunning á økinum og at endurskoða trivnaðarætlanina. Leiðslan tryggjar, at starvsfólkið er væl kunnað um trivnaðararbeiðið í skúlanum. Leiðslan hevur trivnaðararbeiðið á skrá á námsfrøðiligum fundum í minsta lagi 2 ferðir um árið – á fyrsta námsfrøðiligum fundi eftir summarfrítíðina og á námsfrøðiligum fundi í apríl, har trivnaðararbeiðið og – ætlanin verða endurskoðað.

FLOKSLÆRARIN

Flokslærarin hevur ábyrgdina av trivnaðararbeiðinum í sínum flokki og skal samskifta og samstarva við allar viðkomandi partar. Sum part av trivnaðararbeiðinum kann flokslærarin hava floksfund eftir tørvi. Flokslærarin skal eisini, sum part av trivnaðararbeiðinum, hava næmingasamrøður. Flokslærarin boðar heimunum frá, nær næmingasamrøðurnar verða. Arbeiðið verður gjørt í samráð við hinar lærararnar, sum hava flokkin. Flokslærarin viðger eisini evnið á fyrsta felags foreldrafundi eftir summarfrítíðina. Á hesum fundi verður mælt til, at foreldrini skipa ein trivnaðarbólk/foreldraráð.

FØRLEIKASTOVA

Førleikastovan er sett á stovn sum liður í at arbeiða við og loysa trivnaðarviðurskifti og sertilboð til næmingar við serligum avbjóðingum. Undir førleikastovuni virka serlærarar,

AKT-lærarar og lesi- og orðblindalærarar. Eisini er SSP-samstarvið skipað undir førleikastovuna.

TÍTT (tiltøk í tøkum tíma) er ein royndarverkætlan, sum verður skipað undir førleikastovuni.

Førleikastovan samstarvar við heilsusystir, lærarar og sernám. Leiðslan hevur samband/fundir við førleikastovuna minst fýra ferðir um árið. Karin Vatnhamar og Silvurlín Rasmussen leiða førleikastovuna.

HEILSUFRØÐINGUR

Arbeiðið hjá heilsufrøðinginum er í stóran mun fyribyrgjandi og heilsufremjandi. Heilsufrøðingurin kannar og eygleiðir við jøvnum millumbili barnið, frá tí tað er føtt, til tað er liðugt í fólkaskúlanum. Heilsufrøðingurin ráðgevur og stuðlar foreldrunum viðvíkjandi kropsligu, sosialu og sálarligu menningini hjá barninum.

Inga Símunardóttir er sett sum heilsufrøðingur í skúlunum í Fuglafjarðar- og Eysturkommunu. Hon hevur tlf 562375. Les meira um heilsufrøði hjá børnum og ungum á www.gigni.fo.

FORELDUR OG VERJAR

Fylgja við í tí, ið barnið arbeiðir við, og stuðla tí í arbeiði sínum. Vísa virðing fyri arbeiði og arbeiðstíð næmingsins, soleiðis at frítíðir, frítíðarvirksemi og annað, verður lagt uttanfyri skúlatíð. Siga frá um barnið ikki er í skúla. Foreldur og verjar samstarva við skúlan um reglugerðir, so barnið skilir, at vit draga eina línu. Foreldur og verjar eru góðar fyrimyndir. Tey vísa barninum, skúlanum og ábyrgdarfólki virðing, og skúlin virðir tey. Foreldur og verjar fylgja við, at barnið trívist og boða beinanvegin frá, um illgruni er um mistrivna.

FORELDRARÁÐ

Fordrabólkur verður skipaður í hvørjum einstøkum flokki.

NÆMINGURIN

Dugir at vera saman við øðrum og at vísa fyrilit. Sýnir fólkaligan og høviskan atburð. Er væl fyri at taka ímóti undirvísing. Tað vil siga, at hann er úthvíldur og hevur etið – ella hevur ein bita við sær at eta. Møtir til tíðina. Er fyrireikaður, tá hann kemur í skúla. Hevur bøkur og amboð við sær.

HEIMAARBEIÐI

Heimaarbeiðið verður fráboðað á heimasíðu skúlans í seinasta lagi kl. 15. Heimaarbeiði er partur av frálærutilfari skúlans, men tað er ikki soleiðis, at næmingarnir skulu sita heima og læra seg nýtt tilfar. Heimaarbeiðið er venjing av tí, sum frammanundan er lært í skúlanum.

3. AFTURVENDANDI TILTØK Í INNSKÚLINGINI

AUGUST – DESEMBER

Hvønn morgun	Morgunsang. Vit syngja sama sálm í eina viku, síðani lesa vit í felag Faðri vár og aftaná syngja vit eitt vers. Vanliga syngja vit: Klokkan slær ella Faðir fylg mær henda dag.
Hvørja viku	Ein flokkur vitjar á Giljagarði. Tey syngja og aftaná fáa tey bollar og kakao.
Hvørja viku	Hvønn mánaða hava vit: Ein fund í Námsfrøðiliga ráðnum, 2 LP-fundir, toymisfundir og ein fund um tøkni ella annað.
Alt árið	Vit eru við í Listaleypinum. Vit velja okkurt, sum passar til okkara næmingar.
Aug./sep.	Felags foreldrafundur í øllum flokkum. Foreldraráð og vinabólkar verða settir.
Vika 36	Skúlarenning
Vika 39	Brandvenjing
Oktober	TÍTT. TÍTT er stytting fyri: Tiltøk í Tøkum Tíma. Vit gera eygleiðingarskemaið fyri trivnaðin hjá hvørjum einstakum næmingi. Hetta er royndarverkætlan, sum vónandi heldur fram.
Oktober	Lesikanningar saman við Sernámi. Roknikanningar ger skúlin.
Vika 44 til 48	Stig fyri stig. Allir flokkar arbeiða við evninum í umleið 8 tímar. Burtur við happing er eisini ein møguleiki.
15. novembur	Næmingasamrøðurnar eru lidnar. Arkið um trivnaðin hjá børnunum verður brúkt.
5. desembur	Eftirmetingarnar er lidnar. Eftirmetingarnar verða brúktar til ummælini, sum eru grundarlagið undir foreldraviðtalunum. Vit lýsa bæði fakliga- og sosiala støðið hjá næmingunum.
Vika 48/49	Skúlin verður prýddur. Flokslærarin prýðir stovuna saman við sínum næmingum.
Desembur	4 sangløtur í miðhøllini. Allir næmingar eru við.
13. desember	Lusiagongd. Skúlaspírin skipar fyri.
Vika 50	Jólaverkstøð.
Vika 51	Foreldur/avvarðandi at næmingum í innskúlingini verða boðin til hugnaløtu í skúlanum. 3. flokkur framførir fyri foreldrum og næmingum. Síðani fara flokkarnir út í stovuna til jólahugna. Systkin eru ikki boðin við vegna plásstrot.

Vika 51	Felags kirkjugongd. Vit skifta ímillum at vera í Gøtu kirkju og Leirvíkar kirkju. Aftaná verður farið í skúlan til jólatræ. Skúlin liðugur kl. 11.30

JANUAR – JUNI

Januar	Dansitíðin byrjar. Allir næmingar dansa í miðhøllini 1 tíma hvørja viku fram til fastalávint. Ein felags dansidagur er í Gøtu og ein dag í Leirvík.
Februar/mars	Fastlávintshald í skúlanum. Føroyskur dansur saman við foreldrum og øðrum avvarandi. Síðani gera børnini seg klár at sláa tunnu, kattakongurin fær krúnu og pakka. Tey vitjandi fáa ein kaffimunn. At enda fáa børnini ein bita.
12. mars	Grækarismessuhald. 1. flokkur skipar fyri.
Apríl	TÍTT. Vit gera eygleiðingarskemaið fyri trivnaðin hjá hvørjum einstakum næmingi. Hetta er royndarverkætlan, sum vónandi heldur fram.
25. apríl	Flaggdagshald. 2. flokkur skipar fyri.
Mai	Starvsfólkaútferð.
Síðst í mai	Eftirmetingar. Lærarar gera sínar eftirmetingar, sum eru grundarlag undir støðumetunum.
Síðst í mai	Toymisfundir um førleikarnar hjá næmingunum. Bæði teimum fakligu og teimum sosialu.
Síðst í mai	Evnisdagar um náttúruna, fiskar, fuglar og plantur. Vit seta upp 4 akvariir, trý við sjógvi og eitt við feskum vatni. Næmingar koma við fiskum, krabbum o.ø.
Seinasta vika	Vit skipa fyri ymiskum. Vit hava ítróttardag uppi á fótbóltsvøllinum, gongutúrar o.a.

4. Afturvendandi tiltøk í miðdeildini

August – desember

Hvønn morgun	Morgunsangur. Syngja ein sálm, biðja Faðir vár, syngja ein stuttan sálm.
Hvønn mánað	Námsfrøðiliga ráðið hevur fund, 2 LP-fundir og toymisfundir
September	Skúlarenning
1-2 ferðir um árið	Fáa vitjan av Listaleypinum.
Sept./okt.	Foreldrafundir í øllum flokkum. Foreldraráð og møguligir vinabólkar verða settir.
Oktober	Lesikanningar saman við Sernámi. Roknikanningar ger skúlin.
Vika 39	Brandvenjing
November	Næmingasamrøður. Arkið um trivnaðin hjá børnunum verður brúkt.
Desember	Lærarar lata ummæli av fakliga førleikanum hjá næmingunum inn til leiðsluna. Ummælini eru grundarlagið undir foreldraviðtalunum. Vit lýsa bæði fakliga- og sosiala støðið hjá næmingunum.
Desember	Jólaverkstøð tvørtur um flokkar. Verkstøðini eru til dømis baking, klipp, smíð, leiður og annað. Fríggjadagin í jólavikuni er felags kirkjugongd. Vit skifta ímillum at vera í Gøtu kirkju og Leirvíkar kirkju. Vit bjóða foreldrum við í kirkju, tá guðstænastan er í Gøtu.

Januar – juni

Januar	Felags føðingardagur fyri allar flokkar. Hugni floksvís og felags. Sangur, spøl og undirhald. Dagurin er liðugur á middegi.
Februar	Felags dansidagar. Vit venja kvæði í januar og februar. Allir næmingar dansa á Torginum 1-2 tímar hvørja viku fram til fastalávint. Ein felags dansidagur er í Leirvík og ein í Gøtu.
Februar/mars	Fastalávintshald. Flokkarnir verða býttir í 3-4 bólkar við hvør sínari tunnu at sláa. Aftaná dansa vit føroyskan dans, har foreldur eru vælkomin at vera við. Vit enda dagin við onkrum góðum til matna.
Februar	Foreldraviðtalur.
12. mars	Flaggdagshald. Ein tími verður tikin úr tímatalvuni til flagdagshaldið. Øll samlast við flaggið, syngja tjóðsangin og onkrar aðrar sangir. Ein næmingur úr 7. flokki heldur røðu.
Mars	Verkætlan í 7. flokki. Næmingarnir arbeiða í bólkum við einum evni í 5 dagar og leggja fram 6. dagin. 6. dagurin er samstundis ein hugna-/vitanardagur, har 6. flokkur skipar fyri kafé. Sama kvøld er hugnaløta fyri foreldrum í 7. flokki, har næmingarnir leggja fram fyri foreldrunum.

Um várið	7. flokkur møtist við 7. flokk í Fuglafirði. 3. flokkur í Leirvík vitjar. Lærarar samstarva, so flytingin gerst so væleydnað sum gjørligt.
Mai	Landsroyndir. 4. og 6. flokkur fara til landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni.
Mai	Starvsfólkaútferð.
Mai	Brandvenjing
Juni	Toymisfundir um førleikarnar hjá næmingunum. Lærarar lata ummæli av fakligu og sosialu førleikanum hjá næmingunum inn til leiðsluna.
Móti sumri	Ítróttardagur.
Juni	Seturskúli og útferðir. 6. flokkur fer á seturskúla og hinir flokkarnir gera útferðir.

5. ATFERÐARREGLUR

Í Skúlanum í Eysturkommunu vilja vit skapa karmar fyri trivnaði og góðum læriumstøðum, sum gera, at trygt og gott er at vera í Skúlanum í Eysturkommunu.

UPPMØTING

Vit møta rættstundis, úthvíld og væl fyrireikað í skúla.

Um næmingur ikki kemur í skúla, boða foreldur/verjar skúlanum frá saman morgun, sum næmingurin er burtur.

Við longri afturvendandi fráveru kann læknaváttan verða kravd.

FRÍKORTER

Næmingarnir skulu vera á skúlans øki í skúlatíðini.

Næmingarnir eru úti í fríkorterinum, um veðrið er tilvildar.

Alt spæl, bæði úti og inni, eigur at vera so, at tað ikki er nøkrum til ampa. Lærarar hava umsjón við næmingunum í skúlatíðini

TIL OG FRÁ SKÚLA

Næmingarnir eiga at vísa ansni í ferðsluni og at brúka endurskin. Næmingar, yngri enn 10 ár, eiga ikki at koma í skúla á súkklu.

ANNAÐ

Næmingarnir ganga ikki inni í útiskóm.

Næmingarnir skulu ikki hava lutir við sær í skúla, sum kunnu órógva undirvísingina, vera vandamiklir ella vera øðrum til ampa.

Fartelefon skal ikki nýtast í skúlanum.

Øll eiga at fara væl um og taka upp eftir sær.

6. HAPPINGARPOLITIKKUR

ENDAMÁL

Miðað verður ímóti at lærarar, foreldur og næmingar:

- miðvíst arbeiða við trivnaði
- vita hvat happing er
- eru samd um, at happing ikki verður told
- saman arbeiða móti happing
- vita, at vit øll mugu taka ábyrgd, tá ið happing fer fram og at øll samarbeiða um at fyribyrgja happing

HVAT ER HAPPING?

Happing er tá onkur, ímóti vilja sínum, ferð eftir ferð í eitt ávíst tíðarskeið, er offur fyri ágangi frá einum ella frá fleiri persónum.

Beinleiðis happing kann vera:

- harðskapur, t.d. eitt skump, eitt slag eitt spark o.l.
- gerðir saman við hóttanum og háðanum
- óunnilig og særandi orð, t.d. munnliga, við sms-boðum ella við chatting
- „útfrysting" frá felagsskapi og bólkum

Óbeinleiðis happing kann vera:

- gerðir uttan orð, m.a. herming og ljótt kropsmál
- tilvitað látast ikki síggja persón til tess at særa
- niðurgerandi umtala, ið verður søgd umaftur og umaftur í ávíst tíðarskeið Havast má eisini í huga at happing fer fram uttan fyri skúlans gátt og í frítíðini m.a. á alnetinum og við sms-boðum.

HVUSSU FYRIBYRGIR SKÚLIN HAPPING?

Vit arbeiða alsamt við trivnaði í øllum flokkum, so allir næmingar trívast og mennast og kenna seg virðismiklan í felgsskapinum. Hetta verður millum annað gjørt við

- góðum samskifti og samstarvi millum næmingar, lærarar og foreldur
- afturvendandi tiltøkunum
- næmingasamrøðum
- floksfundum
- trivnaðarátøkum
- nøgdsemiskanningum
- at geva næmingunum eina fatan av, hvar eins egna og markið hjá øðrum gongur.
- at arbeiða við at styrkja sjálvsálitið og sjálvsvirðið
- at menna samstarvsevnini hjá hvørjum einstøkum næmingi

HVUSSU FYRIBYRGIR HEIMIÐ HAPPING?

Heimið stuðlar undir trivnaði í skúlanum við

- at læra barnið at síggja tað sum eina dygd at hjápa við trivnaði og fyribyrgja happing

- At læra barnið at siga frá, um tey síggja, at onkur ikki trívist ella verður happaður
- Ikki at tosa neiligt um skúlan, lærarar, onnur børn ella onnur foreldur. Tað órógvar trivnaðin í skúlanum og tollyndi mótvegis hvørjum øðrum í flokkinum.
- At stuðla barninum í at spæla við nógv ymisk børn. Hetta styrkir barnið og minkar um vandan fyri, at summi fella uttanfyri.
- At hugsa um, um tað eru ávís børn í flokkinum, sum barnið ongantíð nevnir ella ongantíð spælir við.
- At eggja barninum til at verja tann, sum ikki megnar at verja seg sjálvan.
- At læra barnið at loysa ósemjur
- At ansa eftir, at barnið tekur væl ímót føðingardagsinnbjóðingum frá øllum. Hetta vísir virðing fyri føðingardagsbarninum.
- At tá barnið bjóðar í føðingardag, so minst til, at øll verða boðin við. Allur flokkurin ella allar gentur/allir dreingir.
- At raðfesta samveru við hini foreldrini í flokkinum.
- At stuðla teimum lærarum, sum raðfesta tað sosiala umhvørvið í flokkinum.

HVAT GERA VIT, TÁ NÆMINGUR VERÐUR HAPPAÐUR?

- Flokslærarin tekur málið upp við flokstoymið, AKT-lærara, heimini og heilsufrøðing
- Saman arbeiða tey um at steðga happingini og aftur fremja góðan trivna fyri øll í flokkinum.

7. ÆTLAN FYRI NÆMINGAR VIÐ ATFERÐARTRUPULLEIKUM

Nógvar ørsøkir kunnu vera til at børn hava atferðartrupulleikar. Tey kunnu hava sosialar trupulleikar, vera kensluliga illa fyri, hava trupulleikar at samskipa uppfatan, motorikk og kenslur. Hetta ger, at tey kunnu hava vánalig samstarvsevni, og tey sosialu krøvini verða ov trupul.

EYÐKENNIR

- Duga illa at lurta
- Fáa brádlig innskot (impulsiv)
- Duga illa at laga seg eftir virknisstøði
- Duga illa at skilja og fylgja boðum og reglum

VIT VILJA

Finna loysnir og mannagongdir so at hesir næmingar framhaldandi kunnu verða saman við sínum floksfeløgum í størst møguligan mun. Hetta fyri at kunna fáa eina so vanliga skúlagongd sum møguligt.

HVØR ER MANNAGONGDIN

Læraararin: finnur/sær/hevur trupulleikan.

Toymið: Viðger trupulleikan og finnur út av/ger eina ætlan um, hvat gerast skal.

Leiðsla: Toymið upplýsir leiðsluna um niðurstøðuna, leiðslan góðkennir.

Foreldur: Verða kunnað um trupulleikan og víðari mannagongd, og avtala verður gjørd um samstarv.

Serlærari/Sernámsdepilin: Verður kunnaður um trupulleikan, ger møguligar kanningar, og hjálpir til at finna loysnir.

Heilsusysturin: Kannar næmingin um hildið verður, at tað er neyðugt, og kunnar.

Lækni: Ger sínar metingar, kunnar.

MØGULIG FYRIBYRGJANDI TILTØK

Trygg viðurskifti eru týdningarmikil, og tí er umráðandi, at so fáir lærarar, sum gjørligt, eru um flokkin.

Skúladagurin má vera væl skipaður. Mest møguligt eigur at verða lagt í fastar ætlanir frammanundan, og broytingarnar ikki gerast ov nógvar. Tá broytingar eru, skulu hesir næmingar kunnast serliga væl.

Um neyðugt verða eyka garðvaktir settar, so betur kann fylgjast við ávísum næmingum.

Neyðugt er at eftirmeta gongdina við jøvnum millumbilum.

Stig fyri Stig (Trin for Trin) www.cesel.dk : 1-4 fl. Lærir børn empati, sosialan atburð og at taka ábyrgd fyri egnum gerðum.

Lions Quest: 6-8 fl. Lærir børnini sosialan atburð.

8. LP (LÆRIUMHVØRVI OG PEDAGOGISK GREINING)

LP stendur fyri læriumhvørvi og pedagogisk greining. Málið við LP-myndlinum er at skapa eitt gott læriumhvørvi, so allir næmingar fáa so góðar treytir fyri sosialari og fakligari menning sum gjørligt.

Kanningar í Noreg hava víst, at úrslitini í móðurmáli, støddfrøði, enskum og náttúrulærugreinum eru økt 0,4 stig hjá næmingum, sum ganga á skúlum, har LP-myndilin verður nýttur. Samstundis eru sosialu førleikarnir hjá næmingunum betraðir, tað er minni ófriður í flokkinum, har eru færri samanbrestir millum næmingarnar og happingin er minkað munandi.

LP er onki hokus-pokus, men ávísar gerðir, sum lærarar avgera at gjøgnumføra og eftirmeta fyri at loysa avbjóðingar í skúlanum. Lærarnarnir lyfta í felag fyri at fáa eitt betri læriumhvøri og teir samskipa ta námsfrøðiligu vitanina, sum teir longu hava.

LP-myndilin byggir á skipanarástøði fyri at skilja hvussu samspælið hjá næmingunum er í skúlaumhvørvinum, og við at broyta skúlaumhvørvið læra og mennast næmingarnir betur. LP-myndilin er býttur í tveir partar: greining og tiltøk. Partarnir skulu ikki blandast saman, og tí má myldilin fylgjast nágreiniliga fyri at fáa besta úrslitið.

9. SORGARÆTLAN

Tilbúgvingarætlan fyri skúlan í Eysturkommunu í sambandi við álvarsliga sjúku, deyða, skilnað og vanlukku. Tilbúgvingarætlanin er ætlað sum eitt amboð hjá leiðslu/ lærarum / starvsfólkum at nýta, tá onkur næmingur ella starvsfólk verða rakt av sorg.

MISSUR HJÁ EINSTAKA NÆMINGINUM:

Hjúnarskilnaður / skilnaður

Tá ið skúlin er kunnaður um, at tað eru avbjóðingar í familjuni, spyr tann kunnaði, um tað er í lagi, at siga tað við starvsfólk, sum eru um barnið. Um avtala er við foreldrini um at siga øðrum starvsfólkum frá, so verður hetta gjørt.
Avtala verður eisini við foreldrini, um flokkurin skal kunnast um hetta.

Við deyða hjá foreldrum og systkjum

- Flokslærarin kunnar leiðsluna og lærarar / starvsfólk um tilburðin
- Flaggið verður vundið á hálva stong
- Flokslærarin kunnar flokkin um tilburðin og tosar um andlátið
- Til morgunsangin verður sagt eitt sindur um tað, sum hent er
- Hóskandi sangur verður sungin t.d. Gud ger meg til eitt lítið ljós. Faðir vár verður lisið
- Um systkin eru í øðrum flokkum, verður sama mannagongd fylgd í øllum avvarðandi flokkum
- Greiða næmingunum frá, at sinnalagið hjá floksfelagnum, sum hevur mist og ber sorg, kann broytast
- Vera um næmingin ta fyrstu tíðina aftaná
- Flokslærarin/toymið fer at vitja. Hava okkurt við til familjuna (t.d. kort, blómur, kaku)

Tá foreldur/systkin verða rakt av álvarsligari sjúku ella vanlukku við møguligum deyða sum fylgju

- Flokslærarin/toymið tosar við næmingin/avvarðandi og kunnar seg um støðuna
- Í samráð við heimið kunnar flokslærarin/toymið flokkin um støðuna
- Greiða næmingunum frá, at barnið, sum hevur sjúk foreldur, ber sorg, og tí kann hava skiftandi sinnalag/atburð
- Hevur næmingurin onnur systkin í skúlanum, tosa starvsfólkini, ið eru um barnið, saman um støðuna
- Kunna næmingarnar um sjúkuna
- Flokslærarin kann kunna seg hjá bókavørðinum um tilfar
- Flokkurin kann senda krans, blómur ella annað, sum næmingarnir sjálvir gjalda.
- Skúlin sendir krans

Tíðin eftir deyðan

- Tíðin eftir deyðsfallið kennist tung og krevjandi fyri tey avvarandi. Stutt sagt: **Lívið steðgar upp.**

- Sorgin er ikki av eftir jarðarferðina, heldur tvørturímóti
- Tíðin er døpur og orkukrevjandi hjá teimum avvarandi. Hetta sæst aftur hjá næminginum m.a. við einsemi og manglandi motivatión
- Umráðandi er, at næmingarnir í flokkinum eru kunnaðir um truplu støðuna hjá floksfelaganum
- Áftaná eina tíð eigur flokslærarin / toymið saman við heilsusystrini at meta um tørvin hjá barninum.
- (skal barnið hava sakkøna hjálp?)

Tá næmingur er leingi burtur vegna sjúku ella annað

- Eggja børnunum í samráð við avvarandi foreldrum at vitja sjúka barnið
- Flokslærarin boðar leiðsluni frá. Leiðslan kunnar lærararnar/starvsfólkini um støðuna
- Flokslærarin/toymið kunnar flokkin
- Flokslærarin skipar fyri tiltøkum: vitjanum – brøv / tekningar

Sjúka við deyða sum fylgju hjá næmingi

- Flokslærarin boðar leiðsluni frá, leiðslan kunnar lærarnar / starvsfólkini um støðuna
- Flokslærarin / toymið kunnar flokkin
- Eitt ljós verður tendrað við borðið hjá deyða næminginum
- Flokslærarin saman við foreldrunum skipar fyri, at børnini fara at fylgja og vísa samkenslu við blómum, sangi ella/og tekningum
- Leiðslan kunnar til morgunsang næmingarnar um deyðsfallið
- Flaggið verður vundið á hálva stong.

Doyr næmingur brádliga

- Leiðslan / flokslærarin/toymið setur seg í samband við heimið fyri nágreiniliga at fáa at vita, hvat er hent, og hvussu støðan er
- Leiðslan / flokslærarin/toymið kunnar flokkin og lærararnar / starvsfólkini
- Morgunin eftir ella so skjótt til ber, kunnar leiðslan allar næmingarnar um hendingina og greiðir somuleiðis frá, hví flaggað verður vundið á hálva stong
- Til morgunsangin verður sungið hóskandi sangur, t.d. Gud ger meg til eitt lítið ljós. Faðir vár verður lisið
- Umráðandi er, at næmingarnir í flokkinum fáa høvi at tosa um hendingina; tí er neyðugt, at flokslærarin er saman við næmingunum tann dagin, fyri betur á henda hátt at kunna práta, spyrja og vísa kenslur. Møguliga verður ein søga lisin
- Lærarin saman við foreldrunum skipar fyri, at børnini fara at fylgja og vísa samkenslu við blómum, sangi ella/og tekningum
- Næmingarnir gera eina minningarbók um næmingin, sum heimið fær
- Eitt ljós verður tendrað við borðið hjá deyða næminginum
- Vitja á grøvini.

MISSUR HJÁ LÆRARA/STARVSFÓLKI:

Tá lærari/starvsfólk gerst álvarsliga sjúkt

- Leiðslan setir seg í samband við viðkomandi
- Leiðslan kunnar lærararnar/starvsfólkini um støðuna, og hvussu víðari verður farið fram
- Leiðslan saman við trivnaðarbólkinum tosa saman um, hvussu starvsfólkini kunnu stuðla

Tá lærari/starvsfólk doyr

- Leiðslan setir seg í samband við familjuna
- Leiðslan kunnar lærararnar / starvsfólki
- Flaggið verður vundið á hálva stong
- Morgunsangurin verður skipaður sum eitt stutt minningarhald
- Skúlin sendir krans
- Skúlin er stongdur til jarðarferðina. Flaggið verður vundið á hálva stong
- Bjóða seg fram at hjálpa

Tá avvarandi hjá lærara/starvsfólki gerast álvarsliga sjúk

- Leiðslan setir seg í samband við viðkomandi starvsfólk
- Leiðslan kunnar lærararnar / starvsfólkini um støðuna, og hvussu víðari verður farið fram
- Leiðslan saman við trivnaðarbólkinum tosa saman um, hvussu starvsfólkini kunnu stuðla

Tá avvarandi hjá lærara/starvsfólki doyr

- Leiðslan setir seg í samband við familjuna
- Leiðslan kunnar lærarar
- Flaggið verður vundið á hálva stong
- Skúlin sendir krans
- Skúlin er stongdur til jarðarferðina. Flaggið verður vundið á hálva stong

10. Kontaktupplýsingar

Leiðsla

Atli F. Johansen, skúlastjóri	atli.frodi.johansen@skulin.fo , tlf 730070
Birgit Frederiksberg, varaskúlastjóri	birgit.frederiksberg@skulin.fo , tlf 730060
Beinta Lervig, skrivari	bn2002v2@skulin.fo , tlf 730080

Lærarar

Beinta Tórolvsdóttir	bt1710i2@skulin.fo
Elisabeth Hansen	elisabeth.hansen@skulin.fo
Tóra á Hólalagnum	tora.a.holalagnum@skulin.fo
Bergfríð Joensen	bj2803j2@skulin.fo
Sædis Eilifsdóttir sædis.eilifsdóttir@skulin.fo	
Gunnvør Hentze	gunnvoer.hentze@skulin.fo
Heidi Sevdal	hs0603b8@skulin.fo
Inger Olsen inger.olsen@skulin.fo	
Karin Jógvansdóttir karin.jogvansdottir@skulin.fo	
Karin Vatnhamar	karin.vatnhamar@skulin.fo
Lív McLeod	liv.mcleod@skulin.fo
Martina Poulsen	anna.martina.poulsen@skulin.fo
Tórhild Bjarkhamar	torhild.bjarkhamar@skulin.fo
Rúni Gaardbo	halvdan.runi.gaardbo@skulin.fo
Súni Olsen	suni.olsen@skulin.fo
Annika Katrin Joensen	annika.katrin.joensen@skulin.fo
Signar á Reynatrøð	signar.a.reynatroed@skulin.fo
Silvurlín Rasmussen	silvurlin.rasmussen@skulin.fo
Sonja Hansen	sonja.hansen@skulin.fo
Birna Z. Lamhauge	bj0610p8@skulin.fo
Valborg Klæmintsdóttir	vk2608u8@skulin.fo

Námsfrøðingar og stuðlar

Arndis Joensen	arndis.joensen@skulin.fo
Gunnvá Thomsen	gt1602eb@skulin.fo
Marjun Guldbro Andreasen	mk1901t6@skulin.fo
Linda í Heimistovu	lj0103g4@skulin.fo
Joan Skoralíð	js0406g4@skulin.fo

Skúlavegleiðari

Magda Magnusdóttir

Førleikastova

Silvurlín Rasmussen, serlærari, leiðari á førleikastovuni í Leirvík
Karin Vatnhamar, serlærari, leiðari á førleikastovuni í Gøtu
Annika Joensen, lesivegleiðari og orðblindalærari
Sharon Kirsty Ellingsgaard, støddfrøðivegleiðari

AKT lærarar

Birgit Frederiksberg
Silvurlín T. Rasmussen

Heilsufrøðingar

Klara í Túni Jacobsen, *heilsufrøðingur í byrjanardeildini* tlf. 562378
Inga Símunardóttir, *heilsufrøðingur í miðdeidini* tlf. 562375

Skúlastýrið

Eydna Lucia Nesá, *formaður og foreldraumboð* lucia@olivant.fo tlf. 229845
Katrin I. Gregersen, *foreldraumboð og næstformaður*
Elinborg Osvalsdóttir, *foreldraumboð*
Magnus Skoralíð, *kommunustýrisumboð*
Marjun Andreasardóttir, *kommunustýrisumboð*
Signar á Reybatrød, *starvsfólkaumboð*
Atli F. Johansen, *skrivari*